**10 TING UM**

# Lisa Lents

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



# Hørð og vøkur

INNFLYTARIN ÚR **HVÍTARUSSLANDI** KANN BÆÐI SMÍLA PENT OG SLÁA HART. **LISA LENTS** ER EUROPAMEISTARI Í TAEKWONDO OG HEVUR TIKIÐ LUT Í **MISS WORLD KAPPINGINI**

**1** 22 ára gamla Lisa Lents varð fødd í Minsk í Hvítarusslandi

**2** Sum 9 ára gomul flýggjaði hon saman við familjuni til Danmarkar, og har hevur hon búð síðani.

**3** **Hon hevur tikið lut í taekwondo kappingum, har tað snýr seg um vísa teknikk og ikki berjast.**

**4** Hon hevur vunnið nógvar danskar og norðurlendskar teknikkappingar í taekwondo. Sum yngri vann hon eisini eitt heimsmeistaraheiti, og sum vaksin kann hon breggja sær av einum europameistaraheiti.

**5** Í fjør umboðaði hon Danmark í kappingini um at gerast Miss World.

**6** Lisa Lents hevur seinnu árini verið nógv frammi í Danmark eitt nú sum modell í mannfólkabløðum og við at luttaka í ymsum sjónvarpssendingum.

**7** Við luttøkuni í kappingini Vild Med Dans er Lisa Lents av álvara blivin kend í Danmark

**8** Hon var fyri nógvum atfinningum frá djóra-verndarfólkum, tá ið hon varð modell fyri pelsar hjá Katja Berglund.

**9** **Lisa tekur útbúgving í media management og annars arbeiðir hon sum modell.**

**10** – Mær dámar at leggja trýst á meg sjálva bæði kropsliga og mentalt, og tí taki eg lut í øllum hesum sendingunum, sigur Lisa Lents, sum hevur tikið lut í fleiri sjónvarpssendingum, har tað ræður um at kappast.

## SITAT



Eg eri ikki nóg ungur til at vita alt

*Oscar Wilde, írskur rithøvundur*

## MIÐLARNIR OG EG

í nýggja táttinum siga kendir og ókendir persónar frá síni miðlanýtslu.



TÓNLEIKARIN OG MIÐLAMAÐURIN **NIELS UNI** ER Á NETINUM 10-12 TÍMAR UM DØGNIÐ.

**MÍTT BLAÐ - DAG OG VIKUBLAÐ**
Eg lesi Sosialin og Dimmalætting ordiliga yvirfladiskt á arbeiðinum, plagi somuleiðis at blaða í Markedsføring. Tá eg onkuntíð keypi eitt dagblað, so er tað tí at forsíðan onkursvegna er áhugaverd.

**MÍN HEIMASÍÐA**
Eg eri nokk online 10-12 tímar um døgnið. At spyrja hvør mín heimasíða er, er sum at spyrja hvat fyri eitt papír lesur tú. Alnetið er bara ein samskiftisformur. Eg brúki alnetið alla tíðina og fái nógv mesta partin av míni dagligu vitan av alnetinum, portal.fo er mest vitjaða síðan, men eisini hinar føroysku tíðindasíðurnar vitji eg javnan, á chelseafc.com lesi eg um fótbólt og hyggi at netvarpi, á onlinefootbalmanager.co.uk spæli eg, á kjak.org kjakist eg, á youtube hyggi eg.

**MÍTT SOSIALA NETVERK**
Facebook er mítt primera sosiala netverk, eg eri eisini á twitter og myspace og ymiskum øðrum, men tað er bert á Facebook, at eg eri ordiliga aktivur.



**MÍN TÓNLEIKUR**
Serliga tvey nøvn eiga eitt stórt pláss í mínum Itunes og fløgusavnið Beck og Black Sabbath, eg havi tó eitt hjarta sum brennur fyri føroyskum tónleiki, her er serliga Høgni Lisberg hot.

**MÍN DVD**
Eg hyggi nærum ongantíð eftir DVD longur, men eg eigi nokkso nógvar, har liggja einar 8-10 sum eg havi keypt, men sum eg enn ikki havi sæð, eg vænti tó, at "The Sixth Sense" við Bruce Willis er ein tann besta í savninum.

**MÍTT MAGASIN**
Keypi bara magasin tá eg flúgvi, og tá er tað F1, ið er eitt blað um Formil 1.



**MÍN SJÓNVARPSRØÐ**
Mær dámar væl kriminalrøðir í løtuni er Dexter nokk tann best umtókta hjá mær

**MÍN BÓK**
Eg haldi at "High Society" hjá Ben Elton er ein tann besta. Fantastisk bók um problemattikin við rúseitri lýstan á ein so ræðuliga skilagóðan máta, blanda við teimum heilt stóru kenslunum og syndarligu lagnunum.




**MÍTT ÚTVARP**
Eg elski gott útvarp, serliga tá eg búði niðri lurtaði eg nógv, P3 var favoritturin tá. Í Føroyum lurti mest eftir Kringvarpinum, fyrst og fremst tíðindasendingunum og seinnapartssendingum við Rúna Jákupssyni, Fróða Løksagarð og Suna Merkisstein, sum eru tað frægasta vit hava í føroyskum útvarpi.

**MÍN TELEFON**
Nokia 6220, eg havi altíð havt Nokia, og hendan nøktar mín tørv og fekst fyri rímiligan penga, tá hin seinasta brotnaði.

**HVAT VIL TÚ IKKI BRÚKA TÍÐ UPPÁ?**
Ringar útvarpssendingar við vertum, ið ikki eru egnaðir til uppgávuna teir eru settir at loysa.

**HVAT IRRITERAR TEG Í MIÐLUNUM?**
Greinar, ið eru skrivaðar av fólki, ið ikki makta sína uppgávu.

**HVAT VIL TÚ HAVA MEIRI AV Í MIÐLUNUM?**
Góðsku

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos